

TIPS FRÁ EYÐUN
eydun@sosialurin.fo

# Spenningur og undirhald

NÚ **FROST** ER Í LUFTINI, **ILLEVEÐURSKVØLDINI** GERAST FLEIRI OG **MYRKRIÐ** HEVUR YVIRLUTAN Á **LJÓSINUM** ER FREISTANDI AT SETA EIN **DVD-FILM** FRÁ. HER ERU NØKUR **BOÐ** UPP Á FILMAR, SUM KUNNA **UNDIRHALDA**, **UPPLÝSA** OG SKAPA SPENNING. Í **RÚGVUNI** ERU NAKRIR NÝGGIR FILMAR, TVÆR **SJÓNVARPSRØÐIR** OG ONKRIR **KLASSISKARAR**




## Ræðuliga rættarmálið

Frá november í 1945 til oktober 1946 komu 20 nazi-leiðarar fyri rættin í Nurnberg. Rættarmálið avdúkað ræðuleikarnar undir seinna veraldarbardaga. Hesin dokumentar-filmurin greiðir frá tiltikna rættarmálinum, og ávarað verður um, at filmurin inniheldur skakandi upptøkur.

Nurnberg Processen

## Spenningur í sinninum

Ein stórsligin spenningsfilmur um ein mann, sum fær sín seinasta møguleika við eini truplari uppgávu. Filmurin gongur fyri seg í einum heimi, har tøknin ger tað møguligt at leita inn í menniskjasinnið. Ein av best umtóktu filmunum í hesum árinum.

Inception







## Øri Basil

John Cleese spælir tann ørligi Basil, sum rekur eitt gistingarhús saman við konu síni. Spanski tænarin Manuel ger ikki støðuna betur, og tað hendir mangt og hvat á gistingarhúsinum. Røðin var í síni tíð send í føroyskum sjónvarpi.

Fawlty Towers
Dvd-pakki




## Vincent sneytar

Ray Winstone er framúr í leiklutinum sum privatdetektivurin Vincent. Hann og hjálparfólkini fáa fløktar uppgávur, sum eisini er persónliga krevjandi.

Vincent
dvd-pakki




## Gainsbourg

Roykfyltar barrir, kvinnur, ein framúr sangari og ein hendingaríkt lív. Søgan um franska sangaran Serge Gainsbourg er gjørd til film. Gainsbourg vaks upp í París undir týsku hersetingini, og í 1960'unum kom rættilig ferð á hansara yrkisleið.

Gainsbourg




## "Ja" og hvat so?

Móti, vinarlag, stuttleiki og sólferð eyðkennir annan filmin í røðini Sex And The City. Nýgifta Carrie og vinkonurnar leita sær úr New York fyri at taka sær av løttum, men tað kann henda nógv á eini feriu.

Sex And The City 2







## Trírøðini pakkað

Filmarnir í trírøðini Millennium eru millum best umtóktu norðurlendsku filmar nakrantíð. Filmarnir byggja á spenningssøgurnar hjá Stieg Larsson, og hevur tú mist onkran part ella part av onkrum part, so kanst tú nú keypa tær ein samlaðan dvd-pakka við øllum trimum filmunum om Mikael Blomkvist og Lisbeth Salander.

The Complete Stieg Larsson
Millennium Trilogy




## Lívið hjá hinum

Virðisløntur filmur um ein sneytara hjá STASI, sum heldur eygað við fólki. Søgan gongur fyri seg í Eystur Berlin í 1984, og sneytarin verður alsamt meira drigin við í lívið hjá teimum, sum hann heldur vakt yvir.

Das Leben Der Anderen

## Tann seki verður ósekur

Nevningarnir eru sannførdir um, at ein maður, sum er skuldsettur fyri eitt morð, er sekur. Allir uttan ein. Tá nevningarnir skulu taka støðu í rættarmálinum, roynir ein maður at seta drápsmálið í nýtt ljós, og spakuliga – og dramatiskt – sannførir hann aðrar menn um, at tann seki kanska ikki er so sekur hóast alt. Ein klassiskur filmur við millum annað Henry Fonda.

12 Angry Men